# Tey ungu mugu eisini syngja teir gomlu sálmarnar

**Í summum kirkjum gongur striltið at fáa urguleikarar til tær vanligu gudstænasturnar. Kunnu ungir urguleikarar loysa henda trupulleikan, samstundis sum ein skapar karmar fyri eini gudstænastu, har fólk í øllum aldrum koma saman í kirkjuni? Tað heldur í hvussu so er ein av urguleikarunum við Skála kirkju, Súni Kristiansen**



*Tónleikurin er ein stórur partur av gudstænastuni, og tí er neyðugt, at kirkjan viðhvørt setur sær sjálvari nakrar sjálvrannsakandi spurningar um tónleikin*

*Savnsmynd*

KIRKJAN
*Snorri Brend*
*snorribrend@yahoo.dk*

– Hvussu fáa vit góðan sálmasang í kirkjuni?

Henda spurningin hava helst mong sett sær, tí sangurin eftir teirra metan er alt ov tungur. Bæði løg og sálmar eru gomul og tala ikki til tíðina í dag.

Ber til at skipa so fyri, at tey ungu eisini tíma at syngja hesar góðu gomlu sálmarnar, har ein til dømis brúkar onnur ljóðføri enn ta vanligu urguna?

– Jú, sigur skálamaðurin, Súni Kristiansen, sum er ein av urguleikarunum í Skála kirkju. Men so er neyðugt at tiltøk verða sett í verk, og at leiðslan í kirkjuni ger nakað við hetta álvarsmálið.

Í blaðnum »KRUNG«, sum KFUM í Havn gevur út, hevur Súni gjørt sær nakrar sera áhugaverdar og viðkomandi tankar um tónleikin í kirkjuni. Her nemur hann við fleiri viðkomandi spurningar, ið kirkjan má taka upp í næstum. Ein teirra er: »Hvussu ber tað til, at kirkjuni vantar urguleikarar, meðan tónleikalívið blómar sum ongatíð áður?«

## Uttan urgu í 900 ár

Í flestøllum kirkjum í landinum finst ein urga ella annað tól, ið kann nýtast til sálmasangin.

Soleiðis hevur verið í eini 100 ár, men hugsa vit um at tað eru liðin stórt 1000 ár síðani at Føroyar vórðu kristnaðar, hevur føroyska kirkjan klárað seg uttan urgu í samfull 900 ár.

– Tí eigur tað ikki at vera ein »ævigur sannleiki« at ein urga altíð skal vera til sangin. Onnur instrument kunnu eisini spæla saman við urguni, ella enntá í staðin fyri urguna, sigur Súni Kristiansen.

Hevur ein kirkja eitt klaver – annaðhvørt elektriskt ella vanligt aukustiskt - gevur tað ótaldar møguleikar fyri fylgispæli til sálmasangin til eina vanliga gudstænastu.

Hann vísir á, at gudstænastan varir í ein góðan tíma, og at kirkjufólkið tá hevur nýtt ein stóran part av tíðini, eina góða helvt, til sang. Her er talan um sálmasangin sjálvandi, men eisini innspæl, útspæl, aftursvar og forspøl til teir einstøku sálmarnar.

– Av tí at tónleikurin er ein so stórur partur av gudstænastuni er neyðugt, at kirkjan viðhvørt setur sær sjálvari nakrar sjálvrannsakandi spurningar um tónleikin.

– Spurt kundi t.d. verið, um kirkjan tónleikaliga situr og svøltar við eitt fullbúgvið borð. Ella um kirkjan yvirhøvur loyvir ungum tónleikarum framat í gudstænastuni, sigur hann.

## Menniskju ella maskinur?

Hesi seinastu árini hava túsundtals ungfólk fingið sær holla frálæru í instrumentspæli við Musikkskúlan. Hetta sæst eisini aftur í tí blómandi tónleikalívinum, ið sæst á nógvum ymiskum økjum her á landi. Men sær ein nakað til hesa menningina innan kirkjugátt?

Summar kirkjur er væl stillaðar við urguleikarum, meðan aðrar mugu annaðhvørt keypa ella leiga sær hjálp, og í Gjáar kirkju er tað ein tøknilig maskina, ið stendur fyri undirspælinum til sálmasangin.

Musikkskúlin »klekir« á hvørjum ári nógvar góðar tangentspælarar, og tí skuldi ikki staðið á at fingið urguleikarar til kirkjurnar. Útboðið er ríkiliga stórt til at metta eftirspurningin, men hann verður kortini ikki mettaður.

## Yngri kreftir framat

Innan kirkjugátt er ikki óvanligt at kirkjutænararnir – og urguleikarar – halda á í tænastuni í mong ár. Aðrastaðni stendur hinvegin á at fáa urguleikarar at spæla til eina vanliga gudstænastu.

– Trúskapur er ein dygd, og ein ólønt tænasta í kirkjuni hevur alstóran týdning. Men verða ikki yngri kreftir settar við, verður heldur eingin menning.

– Og tað skuldi heldur ikki verið neyðugt at urguleikarar sita so mikið tungt á sínum plássum, at eingini nýggjur sleppur framat. Tað eru jú útivið 100 kirkjuligar tænastur í hvørji kirkju um árið, so tað skuldi gagnað øllum um fleiri kundu verið um hesa uppgávuna, sigur Súni.

Eftir hansara meting eigur tað at bera til at fáa ungar tónleikarar inn í kirkjuna, og hervið eisini skapa møguleikar fyri at t.d. eitt klaver ella flygil kann spæla saman við urguni ella ístaðin fyri hesa.

Skulu umstøður skapast fyri ungum tónleikarum er neyðugt við venjing og smærri tillagingum. Ein máti er, at tað er urguleikarin sjálvur sum kemur við uppskoti til eitt lag, og so kann prestur ella deknur velja ein hóskandi sálm til hetta. Og hví ikki onkutíð brúka eitt ljóstak ella eina glaru við sunnudagsskúlaella ungdómssangum til eina vanliga gudstænastu?

## FIMM ÍTØKILIG UPPSKOT

Í greinini gevur Súni Kristiansen eisini fimm boð uppá, hvussu ein kann menna tónleikin í kirkjuni.

1. Tørvurin á urguleikarum. Tað er neyðugt at tørvurin á urguleikarum verður staðfestur á hægstu rók í kirkjuni. T.v.s. at leiðslan í kirkjuni viðgerð spurningin, t.d. á fundi saman við Urguleikarafelagnum, sum júst skal taka sær av hesum økinum
2. Ung mugu sleppa framat urguni. Skriv kundi verði sent kirkjuráðunum við áheitan um at tey, saman við urguleikaranum virka fyri at ung sleppa framat urguni – í fyrsta lagi til venjing, og seinni eisini til gudstænastu. Ber tað til kann hetta verða gjørt í samstarvi við Musikkskúlan.
3. Peningaligur stuðul. Til undirvísing í urguspæli kann verða veittur peningaligur stuðul. Hetta kundi verðið skipað sum serstøk undirvísing, ella sum ískoyti til musikkskúla ella kvøldskúlaundirvísingina.
4. Lættari nótar. Nýútkomna nótabókin við sálmaløgum í lættari útgávu hjá Jens Mortaan Mortensen kundi við góðum avsláttri verið boðin teimum, sum vilja royna seg í kirkjunum.
5. Hóskandi nótatilfar. Urguleikarafelagið ella onkur annar kundi fingið til uppgávu at gjørt eitt yvirlit yvir hóskandi nótatilfar, býtt eftir torleikastigi og møguleika eisini samskipa nótakeyp.

Her eru nógv viðurskifti, ið kunnu føra til eitt skilagott orðaskifti um hesi mál.

Sosialurin tekur fegin móti viðmerkingum og hugskotum til eina menning av tónleikinum í kirkjuni.